# Sosialráðgevi

Eitt avloysarastarv sum sosialráðgevi við fyribils tænastu á pensjónsdeildini í Tórshavn er leyst at seta skjótast til ber og inntil 31.12.02.

**Arbeiðsuppgávur**
- ráðgeva og vegleiða fyritíðar- og fólkapensjónistum
- seta í verk fyriskipanir smb. lóg um almannapensjónir og lóg um samsýning fyri at ansa eldri og óhjálpnum heima
- ráðgeva barnaverndarnevndum
- seta í verk fyriskipanir smb. barnaforsorgarlógini í samstarvi við barnaverndarnevndirnar
- annað.

**Útbúgvingarkrøv og royndir**
- sosialráðgevaútbúgving
- royndir innan almenna fyrisiting
- góður kunnleiki til EDV á brúkarastøði
- góður málburður í føroyskum, bæði munnliga og skrivliga.

**Um deildina**
Arbeiðsøkið hjá pensjónsdeildini er ráðgeving og vegleiðing til pensjónistar, og støðutakan til og fyriskipan og avgreiðsla av veitingum og tiltøkum smb. pensjónslógini, lógini um samsýning fyri ansing og barnaforsorgarlógini.

Á deildini arbeiða 12 fólk.

**Lønar- og setanarviðurskifti**
Setanar- og lønarviðurskifti eru sambært sáttmálan millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið, og starvið er lønt í bólki 5.

Umsóknir við avriti av prógvum o.ø. skulu vera Almannastovuni, Postsmoga 3096, 110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi 02.08.02.

# Kvívíkar Skúli

**Søkir eftir lærara til skúlaárið 2002/2003**

Søkt verður eftir lærara, til eitt tíðaravmarkað starv við Kvívíkar Skúla, skúlaárið 2002/2003.
Starvið er 15 tímar um vikuna.

**Førleikakrøv:**
Lærara, ið kann undirvísa í øllum lærugreinum.

**Um skúlan:**
Kvívíkar Skúli er ein fýraflokkaður skúli við næmingum frá 1. til 7 árgang. Næmingatalið komandi ár er 51. Fimm lærarar eru við skúlan og kemur tú at vera ein teirra. Skúlin er væl útgjørdur við fimleikarahøll, svimjihyli og telduhøli.

**Setanartreytir:**
Starvið verður lønt sambært avtalu millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Lærarafelag í lønarflokki 18.1 til 27.4.

Meir fæst at vita hjá skúlaleiðaranum, Bjarna Heinesen, fartlf. 211504 ella Jan Andreasen tlf 421575

Umsóknir við prógvi og viðmælum skulu sendast til Kvívíkar Skúlastýrið í seinasta lagi 22. juli 2002 kl. 12.00.

**Kvívíkar Skúlastýrið**
Att: Jan Andreasen
340 Kvívík

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Hjálparfólk

Tórshavnar kommuna søkir eftir 2 hjálparfólkum til frítíðarskúlan á Argjum at byrja 12. august 2002.

**Størvini**
Talan er um tvey størv 25 tímar um vikuna. Annað starvið er avloysari fyri hjálparfólk í farloyvi og verður tað í fyrsta umfari til jólar, men møguliga til næsta summar.

**Stovnslýsing**
Á frítíðarskúlanum í AB húsinum ganga 36 børn. Stovnurin er opin frá kl. 7.30 til børnini fara í skúla umleið á middegi. Frítíðarskúlin er stongdur, tá ið skúlarnir hava frí.

**Vit bjóða**
eitt áhugavert starv, har umsøkjarin fær møguleika at virka í einum umhvørvi, sum er í støðugari menning.

**Vit ynskja**
at tú saman við okkum 4 starvsfólkum, vil geva okkara børnum ein góðan, innihaldsríkan og gevandi dag. Vilt tú hjálpa okkum við tí?

**Setanarviðurskifti**
Størvini verða sett 12. august 2002. Løn sambært sáttmála millum Føroya pedagogfelag og Kommunala arbeiðsgevarafelagi.

**Meira fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Charlottu á Váli Olsen, leiðari, tlf.:314989 / 321889, ella Katrina Petersen, samskipara, tlf. 315160.

**Umsókn**
saman við møguligum prógvum og viðmælum skulu vera frítíðarskúlanum á Argjum, AB-Húsið, Reynsgøta, 160 Argir, í hendi í seinasta lagi mikudagin 17. juli 2002.

SNARSKIVAN

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Tannrøktari

Eitt starv sum avloysari fyri tannrøktara í barnsburðafarloyvi, 4 dagar um vikuni, er leyst at søkja frá 26.august 2002.

**Høvuðsuppgávurnar verða:**
- Kanningar av børnum undir skúlaaldur.
- Fyribyrgjandi arbeiði, harundir foyrufyllingar.
- Undirvísing á skúlunum.
- Hjálparfólk við tannrættingarviðgerðir.

**Førleikakrøv:**
Dentur verður lagdur á, at tann sum verður settur hevur góð samstarvsevnir og áhuga at arbeiða við børnum.
Vit nýta elektroniskar journalir, so kunnleiki til edv er ein fyrimunur.

**Setunarviðurskifti:**
Løn sambært avtalu við Starvsmannafelagnum. Arbeiðstíðin er 29 tímar um vikuna.

**Umsókn:**
Umsókn saman við prógv og møgulig viðmælum, skal vera Tórshavnar kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi 5.august 2002.

**Meira fæst at vita:**
Meria fæst at vita um starvið við at venda sær til Sigrid Arge, tannlæknastjóra, tlf: 31 69 68, teldupostadressa: sigrid@torshavn.fo.

Knýtt at tænnlæknastovuni eru umleið 4.900 børn í aldrinum 0 til 16 ár. Tað starvast 5 tannlæknar, 2 tannrøktarar og 13 klinikkassistentar á tænnlæknastovuni

SNARSKIVAN

# Útferð í Norðuroyggjum

**Til limirnar í Bóndafelag Føroya**

Skipað verur fyri útferð í Norðuroyggjum leygardagin 13. og sunnudagin 14. juli. Vitjað verður eisini í Kalsoynni.

Tilmelding á Norðoya Kunningarstovu tlf. 456939 í seinasta lagi fríggjadagin kl. 18.

**Vegna Bóndafelag Føroya**
Andras Joensen
Tlf. 283332

Sosialurin
Veðrið Bilar Lýsingar
Tíðindi Viðmerkingar
Ítróttur Nøvn

Brandt
Blomberg
Hvítvørur til føroyska húsarhaldið
Turkitrumla
5 kg av klæðum
Tíðarstýrd til lágan og høgan tempereatur
prísur fyrr 5.395,-
Nú 4.795,-
pf Klement Petersen
Høgaból • 600 Saltangará • tel. 447560 • fax 448460



# Summarfrí

Vegna summarfrí verður kommunuskrivstovan stongd 22. juli – 9. august 2002.

**Leirvíkar Kommuna**
Postrúm 42
520 Leirvík



# Fulltrúi í Vinnumálaráðnum

Eitt starv sum fulltrúi í Vinnumálaráðnum er leyst at søkja

**Høvuðsuppgávur :**
- At ráðgeva landsstýrismanninum og stjóranum
- At gera uppskot til lógir og kunngerðir
- At hava eftirlit við stovnum
- Málsviðgerð
- Kæruviðgerð

**Førleikakrøv:**
Vit hava hugsað okkum, at tú hevur útbúgving frá hægri lærustovni, eitt nú cand. scient. pol., cand. jur., cand. polit. ella verkfrøðingur. Og hevur góðan kunnleika til edv.
Tú skalt eisini duga væl føroyskt og enskt og duga at arbeiða sjálvstøðugt.

**Vit kunnu bjóða:**
Starvið er til tíðir strævið, men samstundis sera áhugavert við skiftandi uppgávum og við nógvum samskifti úteftir. Vit bjóða:
- Flex-tíð
- Sjálvstøðugt starv
- Skeið og eftirútbúgvingarmøguleikar

**Løn- og setanartreytir:**
Starvið er lønt eftir sáttmála millm Fíggjarmálaráðið og viðkomandi yrkisfelag. Viðmerkjast skal, at setanin umfatar Vinnumálaráðið og stovnar undir tí umframt Løgmansskrivstovuna og onnur ráð.

**Umsókn:**
Umsókn við avriti av prógvum, viðmælum o.ø. skal sendast til:

**Vinnumálaráðið**
**Postrúm 377**
**110 Tórshavn**

innan 22. juli 2002. Starvið verður sett skjótast tilber.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til Arna Poulsen á tel 356060.

VINNUMÁLARÁÐIÐ

# Skipasmiðjan á Skála P/F

**søkir eftir leiðara til stáldeildina.**

**Starvið:**
Sum leiðari av stáldeildini á virkinum fær tú ábyrgdina av øllum faktekniskum spurningum. Leiðarin verður partur av leiðslu felagsins við tilvísing til tekniska leiðaran og stjóran. Leiðarin av stáldeildini skal saman við leiðarunum av hinum deildunum á virkinum og leiðsluni annars, vera við at menna virkið fakliga og tekniskt, somuleiðis sum hann skal viðvirka til at styrkja verandi virksemi og finna nýggjar møguleikar fyri øktum virksemi. Leiðarin skal í samstarvi við onnur vera við til at samskipa arbeiðið á skipasmiðjuni til gagns fyri bæði viðskiftafólk, starvsfólk og virkið sum heild.

Arbeiðsplássið er á Skála.

**Høvuðsuppgávur:**
- at skipa og leiða dagliga arbeiði á stáldeild virkisins.
- at vera við til at leggja ætlanir fyri arbeiði, fylgja hesum upp og saman við leiðslu annars samskipa ymisku arbeiðini frá byrjan til enda.
- at vera við til at mynda leiðsluna á virkinum bæði dagliga og við framtíðini í huga.
- at vera sjakformonnum, starvsfólki, kundum o.ø. til hjálpar í faktekniskum spurningum.
- at vera við í tilboðsrokning og gera metingar av arbeiðum sum heild, bæði fíggjarliga og hvat víðvíkur tíð.

**Førleikar:**
Vit rokna við at tú:
- er skipsbyggjari ella hevur líknandi útbúgving.
- hevur royndir innan stál- og skipasmíð.
- hevur leiðsluroyndir sum formaður ella líknandi og dugir at skipa og leiða arbeiði til gagns fyri starvsfólk, viðskiftafólk og virkið.
- hevur góð samskiftis- og samstarvsevnir.
- hevur evnir at greina sundur fakligar spurningar, viðgerða møguleikar saman við øðrum, taka avgerðir og seta hesar í verk.

**Vit bjóða:**
Eitt sjálvstøðugt arbeiði í einum spennandi umhvørvi við góðum møguleikum fyri fakligari og persónligari menning.
Løn, trygging og eftirløn eftir nærri avtalu partanna millum.

Um hetta hevur tín áhuga ella um tú hevur spurningar hesum viðvíkjandi, vinarliga set teg í samband við okkum á tlf. 44 11 55.

Skrivlig umsókn við upplýsingum um royndir og útbúgving skal sendast til:

Skipasmiðjuna á Skála P/F
att.: Marni Olsen
FO-480 Skála.

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði og freistin at lata inn er 31. juli 2002.

SKIPASMIÐJAN Á SKÁLA
www.faroeyard.fo
skala@faroeyard.fo

P/F Skipasmiðjan á Skála er dóttirfelag hjá P/F Tórshavnar Skipasmiðju og har starvast umleið 75 fólk.

# Summarfrí

Vegna summarfrí verður skrivstovan stongd frá mánadegi 15. juli 2002.

Opið verður aftur mikudagin 31. juli 2002.

**Advokatskrivstovan**
**Fr. Petersensgøta 9**
Halgir W. Poulsen, adv.
Magnus S. Petersen, adv
Fríða Petersen, adv.
Ólavur Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.

Lesið internet Sosialin !




# Heilsuhjálparafelag Føroya

Skrivstovan er afturlatin vegna summarfrí frá mánadegi 15. juli. Opið er aftur mánadagin tann 5. august.

**Nevndin**

Sosialurin
veitst tú ikki tað?
Sosialurin